# Kjak



Edmund Joensen

## 18 milliónir til Saltsilo á Tvøroyri

Eftir samrøður við Edmund Joensen, fólkatingsmann, hevur danska stjórnin givið tilsøgn um, at 18 mió. kr. fara av donsku fíggjarlógini í grunnin aftan fyri Saltsiloina á Tvøroyri

- Saltsiloin á Tvøroyri fær nú eina góða og hjálpandi hond frá donsku stjórnini og Fólkatinginum, og verkætlanin er við hesum komin væl nærri veruleikanum.

Hetta sigur Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður, nú tað er greitt, at 18 mill. kr. á donsku fíggjarlógini eru markaðar til at endurreisa Saltsiloina á Tvøroyri og umskapa hana til eitt mentunarhús

Eftir samrøður millum Edmund Joensen og donsku stjórnina er avgerð tikin um, at Saltsiloin á Tvøroyari skal raðfestast. Pengarnir eru á fíggjarlógini í einari pulju saman við øðrum verkætlanum.

- Upphæddin er tøk og verður útloyst, tá øll fíggingin til Saltsiloina er fingin upp á pláss, sigur fólkatingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum, ið eisini virkar sum goodwill ambassadørur fyri Saltsilo-verkætlanina.

- Tað er at fegnast um, at samstarvið við donsku stjórnina og Fólkatingið eisini kann bera frukt á henda hátt, sigur Edmund Joensen.

Fólkatingsmaðurin heldur, at Saltsilo-verkætlanin fær stóran týdning, tá hon gerst veruleiki. Fyri landið alt kann hon fáa stóra mentunarliga ávirkan. Hon kann lyfta upp Suðuroynna, ið er harðari rakt av fráflyting og arbeiðsloysi enn meginøkið, og kann gerast eitt slag av mentunarligari dynamo og skapandi savningarstað í oynni. Harumframt kann verkætlanin kasta fleiri arbeiðspláss av sær í samband við bygging, rakstur o.a.

Hetta er aðru ferð í trý ár, at Fólkatingið setur pening av til eina verkætlan í Føroyum, eftir samrøður millum Edmund Joensen og donsku stjórnina.

Fyrru ferð var í 2008, tá Havstovan fekk eina játtan á uml. 10 mió. kr. til eina verkætlan við fleiri Ph. D.-lesandi. Verkætlanin skal vísa, hvussu føroyskir fiskastovnar verða ávirkaðir av veðurlagi og havstreymum.

Henda spennandi verkætlanin er komin væl áleiðis og endar í 2011, tá úrslitið verður lagt fram.



Helgi Abrahamsen
*løgtingsmaður*

## Føroyingar búgva eisini í Føroyum

»Føroyafrádrátturin hevur stóran týdning fyri føroysk lesandi í Danmark.« Tað stendur í einum tíðindaskrivi frá (ja haldi tykkum fast) Tjóðveldi. Men nú ætlar danska stjórnin at lækka henda serliga frádrátt í skattinum hjá føroyskum lesandi í Danmark. »Tískil vil eg hava greiðu á, um nakað kann gerast fyri at broyta hesa avgerð,« sigur Høgni Hoydal í tíðindaskrivinum.

Tveir dagar áðrenn hetta tíðindaskrivið varð almannakunngjørt, viðgjørdi løgtingið í samfullar 4 tímar, blokkstuðulin (altso stuðulin til føroyingar í Føroyum). Men tá var støðan ein heilt onnur. Tjóðveldisumboðini í fíggjarnevndini mæltu til, alt fyri eitt at fara undir samráðingar við donsku stjórnina um eina endaliga búskaparliga uppgerð, sum skjótast gjørligt skipaði okkum sum fullveldisríki.

Ein annar minniluti í fíggjarnevndini (Bill Justinussen úr Miðflokkinum) skeyt upp at lækka blokkstuðulin. »Verður hesin leisturin nýttur, er møguleiki fyri eini tryggari gongd burtur úr teimum bindingum, sum gjald fyri vald altíð hava við sær,« stóð í hansara áliti.

So meðan hesir flokkar kalla danskan stuðul til føroyingar í Føroyum fyri »gjald fyri vald«, »eiturinnspræning« og mangt annað, so hevur danskur stuðul til føroyingar í Danmark »stóran týdning«.

Vónandi hava hesir flokkar ikki gloymt, at føroyingar búgva eisini í Føroyum.



Dávid Isfeld
*Hósvík*

## Smábygdirnar minka eisini í fólkatali

Eg havi skrivað nógv um útoyggjar síðstu dagarnar, tí at hesar hava kostað og koma eisini at kosta nógv – ov nógv – í framtíðini. Eg vóni, at fólk á útoyggjunum, og fólk við tilknýti hartil, duga at síggja, at eg ikki havist at teirra livihátti, men at eg havist at mongu krøvunum um víðka ella betri ferðasamband, sum heilt einfalt er ov kostnaðarmikið. Sjálvur dámar mær sera væl at vitja í útoyggjum eins og aðrastaðni í Føroyum, men tað er ikki tað, hetta snýr seg um. Tað snýr seg um landsins íløgur, og at fáa nakað fyri pengarnar, soleiðis, at tað antin kemur nógvum fólki at gagni ella mennur viðkomandi stað, so tað kunnu koma fleiri inntøkur hagani í framtíðini – nakað fyri nakað. Vit mugu duga at skyna ímillum íløgur og "gávur".

### Smábygdirnar

Hóast framdar samferðsluíløgur minkar fólktalið á útoyggjunum. Og hóast koyrisamband úr smábygdum á stóru oyggjunum, minkar fólkatalið eisini har. Niðanfyri eru nøkir dømir um bygdir, har fólkatalið er minka. Tølini eru frá Hagstovuni:

*Sí talvu*

**Búseting í smábygdum síðan 1985:**

| | | |
|---|---|---|
| **Oyndarfjørður:** | 1985: 178 fólk | 2010: 149 fólk (81 m., 68 kv.)* |
| **Elduvík:** | 1985: 44 fólk | 2010: 24 fólk (14 m., 10 kv.) |
| **Funningsfjørður:** | 1985: 95 fólk | 2010: 60 fólk (34 m., 26 kv.) |
| **Hellur:** | 1985: 43 fólk | 2010: 19 fólk (10 m., 9 kv.) |
| **Funningur:** | 1985: 104 fólk | 2010: 69 fólk (38 m., 31 kv.) |
| **Gjógv:** | 1985: 89 fólk | 2010: 39 fólk (22 m., 17 kv.) |
| **Haldórsvík:** | 1985: 207 fólk | 2010: 134 fólk (75 m., 59 kv.) |
| **Tjørnuvík:** | 1985: 75 fólk | 2010: 71 fólk (34 m., 37 kv.) |
| **Norðadalur:** | 1985: 39 fólk | 2010: 17 fólk (6 m., 11 kv.) |

* "m." merkir "menn"; "kv." merkir "kvinnur"

**Búseting íalt:** 1985: 874 fólk 2010: 582 fólk
Hetta er ein minking upp á 33,4% (ein størri minking enn á útoyggjunum)

Eins og við útoyggjunum er bara at staðfesta, at fólk nú á døgum eru ikki nøgd við at knæ-bóndast og sita heima og binda aftan á dagsins yrki. Tað er heldur einki ringt í tí – ella gott. Tað er líkamikið. Tað, sum hevur týdning, er at ásanna, at tað er so; og síðan handla eftir tí veruleikanum, ístaðin fyri at tvíhalda um eina tíð, ið fór afturum í restini av Evropa fyri150 árum síðan.

Vit mugu bara venja okkum við tankanum, at tað í nærmastu framtíð bert verður ein ella tveir bóndir í Svínoy, Fugloy, Kalsoy, Hestoy o.s.fr. Hetta kann tykjast harmiligt, men tað kann eisini gera, at bóndavirksemi har verður størri, betri, meira framkomi og meira umfatandi, t.d. dyrkan av jørðini, vakstrarhús. Tað hevði verið sera hugtunkt, um útoyggjarnar avtoftast heilt. Vónandi verður tað ikki so. Vit vóna øll tað besta.